# um allan heim

**Øll heimsins lond**
Tað er suðurafrikanarin Graham Powers, sum fyri seks árum síðani fekk eina sjón um at savna kristin í allari verðini til bøn hvítusunnudag at biðja fyri londum sínum.

Fyrsta tiltakið varð hildið í 2001 á Newland stadion í Cape Town, har tað eydnaðist at savna 45.000 fólk til bøn.

Í 2002 vóru 8 ymisk pláss í Suðurafrika umboðaði. Í 2003 savnaðust milliónir av trúgvandi á 130 ymiskum stadion í Suðurafrika. Árið eftir var talið komið upp á 58 lond.

Í fjør var fyrsta árið, ið bønardagurin varð globalur, við 220 milliónum biðjandi kristnum í 156 londum.

Tiltakið hevur nú breitt seg til 198 lond. Onkur einstøk samkoma í Føroyum hevði boðað frá luttøku, og tí vóru Føroyar eisini á listanum millum luttakararnar. Men enn hevur ikki verið skipað fyri tiltakinum alment her.

Visjónin er, at tað í seinasta lagi í 2010 skulu vera luttakarar úr øllum teimum 245 tjóðum heimsins við í tiltakinum.

Og væntandi teljast Føroyar komandi ár millum londini, ið tvørkirkjuliga fara at skipa fyri uttandura tiltøkum á altjóða bønardegnum The Global Day of Prayer.

Komandi árini verður tiltakið hildið hvítusunnudag við orðunum úr Habakkuk 2, 14 sum yvirskrift:
"Tí jørðin skal verða full av kunnskapi um dýrd HARRANS, eins og havsdjúpið er fult av vatni."

Les meira á:
*www.gdopusa.com* og
*www.kristnastova.dk*




*Føroyar og Grønland vóru eisini umboðaði á Ráðhúsplássinum hvítusunnudag á altjóða bønardegnum The Global Day of Prayer.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*





**Skjótt og bíligt av landinum - tá tað passar tær**

| | | Prísir úr: |
|---|---|---|
| Keypmannahavn | Upp í 27 ferðir um vikuna | 2020 |
| Billund | Upp í 7 ferðir um vikuna | 2046 |
| Aalborg | Upp í 2 ferðir um vikuna | 2068 |
| Rekjavík | Upp í 5 ferðir um vikuna | 1747 |
| London | 2 ferðir um vikuna | 2072 |
| Aberdeen | 2 ferðir um vikuna | 1938 |
| Hetland | 2 ferðir um vikuna | 2037 |
| Oslo | 2 ferðir um vikuna | 2033 |
| Stavanger | Upp í 2 ferðir um vikuna | 1832 |
| Stord | 1 ferð um vikuna | 1832 |
| Narsarsuaq | 2 ferðir um vikuna | 5874 |

... og tá eru skatturin og onnur avgjøld íroknað.

Prísirnir eru við keypi á atlantic.fo
Les meira á heimasíðuni.

www.sansir.fo

Bilegg feðaseðilin á tíni ferðaskrivstovu ella á www.atlantic.fo

ALPHA Tel 352 900 | Faroe Travel Tel 312 600 | FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000 | FONN FLOG Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum | www.atlantic.fo